# Stórsligið sølutorg í Vágsbotni

**Tað var næstan sum á Ólavsøku, tá sølutorgið til fisk og fugl varð tikið alment í nýtslu fríggjadagin. Við horntónleiki og røðum var løtan hátíðarkend, og í mongu básunum kundu fólk keypa sær feskan og ræstan fisk og fugl afturvið hugnaligu tónunum frá einum harmonikuliði**









SØLUTORG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað kann ikki sigast, at sølutorgið í Vágsbotni hevur verið nøkur snar-verkætlan. Tvørturímóti. Men nú er hendan verkætlanin so endiliga veruleiki.

- Eg má viðganga, at tað hevur tikið óvanliga langa tíð at fáa hetta tiltakið til veruleika, segði Elin Lindenskov, forkvinna í Mentanarnevndini hjá Tórshavnar býráði.

Hon segði, at tað eru mong ár síðani, at tað av fyrstan tíð varð byrjað at tosa um betraðar umstøður til sølu av fiski og fugli, men viðgerðin gekk ógvuliga seint. Og tá so arbeiðið var boðið út og arbeiðstakari góðtikin, gekk munandi longri tíð at gera arbeiðið liðugt, enn framman undan roknað við.

Men fríggjadagin var so alt liðugt, og undir hátíðarligum karmum varð sølutorgið alment tikið í nýtslu.

Býráðið hevði framman undan syrgt fyri, at básarnir vóru upptiknir so eisini nakað var at selja og keypa hjá fólki. Og eins og borgarstjórin segði í sínari røðu, so var hetta ikki bert eitt sølutorg fyri havnarfólk, men fyri allar Føroyar. Tí har vóru sølufólk heilt norðan úr Hvannasundi og út til Nólsoyar.

Hátíðarhaldið byrjaði við horntónleiki, hugsi líka skjótt, at tað var Havnarmarchurin, ið tónaði fyrst. Síðani bjóðaði Elin Lindenskov, forkvinna í Mentanarnevndini hjá býráðnum vælkomin, og eftir enn eitt lag frá hornorkestrinum segði borgarstjórin, Heðin Mortensen, nøkur orð.

## Alt godt fra havet

Heðin Mortensen nam við gomlu traditiónina hjá avbygdafólki – serliga nólsoyingum – at koma í Vágsbotn at selja alt slag av fiski og fugli. Ikki minst í nátatíðini var og er lívligt í Vágsbotni. Hann vísti til fleiri navngivnar havnarmenn, sum nærum dag og dagliga stóðu í Vágsbotni og seldu fisk.

Bæði borgarstjórin og forkvinnan í Mentanarnevndini vístu á, at sølutorgið bara var fyrsta stigið í einari størri ætlan at fríðka um og hugna um í einum størri økið, sum eisini umfatar Vágsbotn. Millum annað verður skjótt ein úticafé at síggja í Vágsbotni, og »i dagens anledning« hevði Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Sjómansheiminum og Hotel Føroyum, sett upp borð og stólar undir stórum parasollum. Nakað, sum hugnaði eyka um hendan dagin.

Í básunum var sum nevnt alskyns góður føroyskur matur. Har var ræstur fiskur, turrur fiskur, feskur fiskur, feskur kalvi, havtaska, hummari, longa, knettir, frikadellir og feskur náti. Stutt sagt »alt godt fra havet« og nakað nógv aftrat.

Og væl gekst at selja. Sølufólkini lótu sera væl at, og undirritaði, sum hjálpti versoninum í einum av básunum at selja góðar fjøruti nátar, fekk lítið meiri enn vent sær, áðrenn alt var uppi.

Gamli skiparin og reiðarin, Mortan Johannesen, stóð í einum bási og seldi nakrar vælvaksnar toskar, ið – sum hann segði – fáar tímar framman undan høvdu svomið á havsins botni.



## Komi avgjørt aftur

Sum nevnt var hátíðarhaldið ógvuliga væl vitjað, og fólk vóru sera væl nøgd við tað, tey sóu. Mortan Johannesen, sum í dag er ein av føstu fúsunum í Vágsbotni, helt, at nýggja sølutorgið var sera kærkomið, og honum líktist sera væl á.

- Her kunnu fólk koma at keypa sær ein døgurðabita undir góðum umstøðum. Og her kunnu tey fáa tað allarfeskasta, segði Mortan Johannesen.

Eisini sølufólkini frá Hvannasundi lótu sera væl at. Umstøðurnar hildu tey vera góðar, og somuleiðis lótu tey væl at søluni.

Men ikki bara seljararnir lótu væl at, mongu fólkini, sum vóru komin saman í Vágsbotni vóru fegin um nýggja sølutorgið.

- Hetta hevur manglað í Havn. Her komi eg avgjørt aftur at keypa okkum ein døgurðabita, segði ein kvinna, vit tosaðu við í Vágsbotni fríggjadagin.

So øll – politikarar, sølufólk og keyparar – vóru á einum máli um, at hetta var eitt gott og tiltrongt tiltak, sum sett er í verk í Vágsbotni.

Og, sum borgarstjórin tók til í røðu síni:

» Arbeitt verður við eini heildarloysn fyri alt økið við Vestaruvág, í Vágsbotni og niðara parti av Tórsgøtu, tí vit síggja nógvar møguleikar at gagnnýta økið betur og ikki minst, at vit fáa eitt hugnaligt umhvørvi her undir Bryggjubakka og fram við vágni. At bryggjukanturin seinastu árini mest hevur verið brúktur at parkera bilar á, halda vit, er ov meiningsleyst«.

Og við sølutorginum má sigast, at fyrsta stigið í teirri heildarloysnini er tikið.